# Minni áhugi fyri Saab

Tríggir keyparar hava víst áhuga fyri svensku bilverksmiðjuni Saab. Tað sigur bústjórin Guy Lofalk. Áhugin var kortini munandi størri, tá General Motors lýsti Saab til sølu. Sambært svenskum fjølmiðlum bóðu meiri enn 20 feløg um fleiri upplýsingar, og nøkur teirra sendu eisini umboð til Svøríkis at kanna viðurskiftini. Guy Lofalk vil ikki siga, hvørjar fyritøkurnar eru, sum framvegis hava hug at keypa Saab, men hann váttar, at talan er um fyritøkur úr ymsum londum. Fjølmiðlarnir hava gitt, at kinesiskar bilverksmiðjur og italska Fiat hava hug at yvirtaka Saab.



*Kristian Martin Rasmussen, reiðari, sigur, at tað verða synirnir, Jón og Bogi, sum fara at skiftast um at føra nýggju Norðborg, meðan triði sonurin, Eyðun, er virkandi stjóri á skrivstovuni. - Vit fara tó allir við á fyrsta túrin, og tá alt fer at rigga, sum tað skal, fara Jón og Bogi at skiftast um brúnna, sigur hann*
*Mynd: Dávur Winther*



at hetta fer at eydnast okkum við samráðingarnar komandi ár. Tað eru norðmenn og russar, sum sita á lodnuni í Barentshavinum. Vit hava altíð fingið burtur av hesum stovni, síðan fiskimørkini vórðu flutt úr á 200 fjórðingar – til lodnustovnurin gjørdist so illa fyri, og veiðan helt uppat. Nú eru teir aftur farnir at fiska lodnu, men eru varnir í byrjanini.

Hann sigur, at skipanin við lodnuveiðini í Barentshavinum hevur verið hon, at føroyingar eisini kundu fiska av russisku kvotuni í norskum sjógvi – og øvut.

- Vit høvdu eini 2-3 góð ár á lodnuveiði. Tað er rognalodnan, sum verður heilfryst, meðan hann-arnir fara til mjøl. Tá vit vóru á hesi veiði, noyddust vit at leiga okkum skip, sum kundi føra hann-lodnuna til lands. Vit fingu einki burtur úr fiskinum, sum aðrir førdu fyri okkum til lands. Hetta er ein orsøkin til, at vit nú eisini hava fingið okkum mjølverksmiðju umborð á nýggju Norðborg, soleiðis at vit kunnu framleiða mjølið sjálvir.

Kristian Martin vísir á, at hetta skuldi givið ein uppaftur betri rakstur, tá høvi aftur verður hjá teimum at fara á lodnuveiði.

## Eru vónsviknir

Nú so nógv hevur verið frammi um svartkjaftabýtið og eitt nú feløgini, sum eiga og reka pelagisku skipini í Gøtu, hava víst sína stóru misnøgd, heldur reiðarin í Klaksvík fyri, at Norðborg so sanniliga er vorðin sektað fyri at hava meirvirkað tilfeingið.

- Vit eru vónsviknir av, at Norðborg fekk so lítið í sín part. Vóru tað ikki somu eigarar, sum áttu Christian í Grótinum og Norðborg, hevði ikki sæð væl út í dag, nú vit eru komnir við nýggjum verksmiðjuskipi.

Kristian Martin vísir á, at við tað, at Norðborg hevur verið framleiðsluskip og soleiðis hevur roynt at fingið sum mest burtur úr tilfeinginum, hevur skipið fiskað lutfalsliga minni nøgdir enn onnur skip, sum hava landað størsta partin av veiðini til ídnað.

- Hetta eru vit sektaðir fyri í verandi býti, og tað halda vit er skeivt, leggur hann aftrat.

Reiðarin vísir á, at Norðborg hevur fiskað svartkjaft heilt síðan 1977, men at hetta saman við meirvirkingini seinastu 7-8 árini ikki hevur givið skipinum tey rættindi, ið hann heldur, at teir áttu at fingið í einum kvotubýti.

## Fullar koyggjur

Nú nýggja Norðborg loysir um einar 2-3 vikur, verða allar koyggjurnar umborð fullar, sum Kristian Martin tekur til.

- Vit ætla at byrja við 34 monnum, sigur hann.

Byggikostnaðurin av skipinum saman við eykakostnaði og byggirentum liggur um 250 miljónir krónur, og reiðarin metir, at samlaða verkætlanin fer at standa í umleið 280 miljónum, tá skipið loysir.

- Tað er eitt sindur trupult at siga, hvussu nógv vit skulu fiska fyri, um rakst-urin skal hanga saman. Hetta veldst eitt nú um oljuútreiðslur og útreiðslur annars. Men hugsandi er, at vit helst skulu selja fyri millum 70 og 100 miljónir krónur um árið, sigur reiðarin í Klaksvík, Kristian Martin Rasmussen.